Havnar Bóltfelag
Stovnað: 17.10.1904
FO-110 Tórshavn, Postrúm 1333
Tlf. 314046/Fax 318202
Formaður: Birgir Enghamar

**Meistarar (16):** 1955, 1960, 1963, 1964, 1965, 1971, 1973, 1974, 1975, 1978, 1981, 1982, 1988, 1990, 1998, 2002
**Steypavinnarar (25):** 1955, 1957, 1959, 1962, 1963, 1964, 1968, 1970, 1971, 1972, 1973, 1975, 1976, 1978, 1979, 1980, 1981, 1982, 1984, 1987, 1988, 1989, 1992, 1995, 1998
**Greipuvinnarar (11):** 1955, 1963, 1964, 1971, 1973, 1975, 1978, 1981, 1982, 1988, 1998
**Í 1. Deild (60 ár):** 1942-1943, 1945-
**Í Europa (8):** Meistarakapping 1999/00, Steypavinnarar 1993/94, 1996/97, 1997/98, UEFA Cup 1998/99, Intertoto 1995/96, 2000/01, 2001/02

# HB skal verja gullið

**Høvuðsstaðarfelagið plagar ikki at fjala út yvir, at teir eru við fyri at vinna. Nú skal meistaraheitið frá í fjør verjast**

Eyðun Klakstein

HB setir sær á hvørjum ári høg mál um at vinna alt í føroyskum fótbólti, og hóast teir í fjør snávaðu í avgerandi dystinum um steypagullið, var alt frøi og gaman í landskappingini.

Nú skal FM-heitið verjast, og tað ætlar HB at gera við nógvum av somu spælarunum, sum vóru við í fjør, og við nýggjum profilum.

Tað gjørdist nakað rokut í HB í fjørsummar, men endaði alt so sera gott, tá ið spælararnir fingu gullmerkini hongd um hálsin á seinasta leikdegi.

Kring summarsteðgin steðgaði tað upp hjá HB, og tá ið felagið hevði tapt týðandi dystir fyri KÍ og B36, fekk venjarin seinastu fýra árini, Ion Geolgau, sekkin. Í hansara stað komu Jóannes Jakobsen og Kári Nielsen, og teir fingu skútuna aftur á beint og fingu gullið í havn.

Nú verður tað Frank Skytte, sum skal hava ábyrgdina av HB-liðnum, og afturat sær hevur hann fingið Oddbjørn Joensen, sum áður hevur røkt uppgávuna sum venjari og hjálparvenjari hjá besta HB-liðnum.

## Verjan skal fóta sær

HB hevur mist onkrar spælarar síðani kappingarárið í fjør, og hetta hevur serliga gingið út yvir verjupartin. Jón Rói Jacobsen, sum bæði spældi í verju og álopi, er leigaður til Brøndby, Jóhannis Joensen er farin í Vágarnar at spæla, og Hans á Lag er farin uttanlands.

Men HB hevur styrkt seg við donskum verjumanni, sum tó ikki hevur spælt nakað enn, tí hann hevur verið skaddur. Tað kom eisini væl við, at Jan C. Dam, sum hugsaði um at gevast við fótbóltinum, í øllum førum spælir hetta árið afturat. Hann er álitið í miðverjuni og er góður at stuðla nýggjum verjumonnum. Higartil hevur hann spælt nógv saman við unga Eli Thorsteinsson, og samstarvið hevur verið gott.

Á miðvøllinum eru nógvir góðir spælarar um boðið, og við dygdarspælarum sum Rúna Nolsøe, Rógva Jacobsen og Nicu Dogaru á hesum plássum kann miðvøllurin ikki vera nógv sterkari.

Álopið hjá HB var í stórformi í fjør, og nú felagið hevur fingið sær nýggjan styrk úr Danmark, er líkt til, at málskjótingin ikki fer at vera trupulleikin. Andrew av Fløtum var toppskjútti í kappingini í fjør, og nú ætlar danin Karsten From eisini at bjóða av á hesum øki. Hann hevur longu fingið eina góða byrjan í venjingar- og steypadystum.


*Nú skal FM-heitið verjast, og tað ætlar HB at gera við nógvum av somu spælarunum, sum vóru við í fjør, og við nýggjum profilum.*
Mynd: Álvur Haraldsen

## Leikarahópur

Tølini, sum eru viðmerkt, siga, hvussu nógvar dystir/mál leikarin spældi/gjørdi fyri felagið í 2002, og hvussu nógv (gul-reyð) kort leikarin hevur fingið í sama tíðarskeiði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Bárður Johannesen | 17/-14 (1-1) | | |
| Pól N. Joensen | 5/0 (0-0) | | |
| Lars Müller | | | TB, Royn |
| **Verja** | | | |
| Martin Christiansen (DAN) | | | |
| Eli Thorsteinsson | | | |
| Janus M. Joensen | 15/0 (0-0) | | |
| Jan C. Dam | 16/0 (1-0) | 39/1 | B68, KÍ, Skansin |
| Bergleif Sólsker | | | B71 |
| Rani D. Christiansen | 1/0 (0-0) | | |
| Vagnur M. Mortensen | | | |
| **Miðvøllur** | | | |
| Kári Nielsen | | | Skála, B71 |
| Nicu Dogaru (RUM) | 15/0 (6-0) | | |
| Rúni Nolsøe | 17/2 (3-0) | 3/0 | VB |
| Rógvi Jacobsen | 17/3 (3-0) | 18/1 | KÍ |
| Símun Eliasen | | 2/0 | ÍF, KÍ |
| Bjarni Jørgensen | 6/0 (0-0) | | |
| Hallur Danielsen | 14/0 (1-0) | | |
| Hendrik Rubeksen | | | |
| Teitur Ellingsgaard | | | |
| Páll M. Joensen | 1/0 (0-0) | | |
| Høgni M. Joensen | | | |

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Álop** | | | |
| Karsten From (DAN) | | | |
| Andrew av Fløtum | 18/18 (1-0) | 7/0 | |
| Rókur á Fløtum Jespersen | | | |
| Tór-Ingar Akselsen | 16/0 (1-0) | | FSV |
| **Tilgongd** | | | |
| Lars Müller | 18/0 (2-1) | TB | |
| Martin Christiansen (DAN) | | Danmark | |
| Bergleif Sólsker | | B71 | |
| Kári Nielsen | 13/1 (5-0) | Skála | |
| Símun Eliasen | | Heim úr Danmark | |
| Karsten From (DAN) | | FC Midtjylland | |
| **Frágongd** | | | |
| Hans á Lag | 17/7 (4-0) | Uttanlands | |
| Jóhannis Joensen | 17/1 (3-0) | FS Vágar | |
| Jón Rói Jacobsen | 18/12 (0-0) | Brøndby | |
| Nocko Jokovic (DAN) | 6/4 (0-0) | Uttanlands | |
| Pætur M. Dahl | 6/0 (2-0) | AB | |
| Uni J. Arge | 5/2 (0-0) | Givin | |
| Ingi Rasmussen | 5/0 (0-0) | Givin | |
| Eyðun Samuelsen | 4-1 (0-0) | AB | |
| **Venjari:** | | | |
| Frank Skytte | | | |



# Karsten stílar høgt

**– Eg havi ongantíð áður møtt so fyrikomandi fólki sum føroyingum, men spælararnir eru sera harðir við hvønn annan á fótbóltsvøllinum, sigur danski álopsspælarin hjá HB, sum ætlar sær at gera nógv mál fyri nýggja felag sítt**


*– Tað verður sjálvandi spennandi, um eg kann menna meg sum spælari her og halda meg á einum høgum støði. Hetta er ikki sama støðið sum í superliguni, og so er freistandi at hugsa, at so verði eg ein verri fótbóltsspælari, men tað er ikki vist, sigur Karsten From, sum stílar eftir oddasessinum á toppskjúttaralistanum.*
Mynd: Álvur Haraldsen

Eyðun Klakstein

HB hevur aftur í ár sent boð eftir einum góðum donskum álopsspælara. Karsten From er maðurin, sum skal gera mál fyri høvuðsstaðarfelagið, og hann hevur sett sær høg mál fyri hetta árið.

– Málsetningurin hjá mær er broyttur fleiri ferðir, síðani eg gjørdi av at koma til Føroya. Fyrst var ætlanin bara at koma higar og koma í gongd við fótbóltin aftur. Síðani fekk eg at vita, at HB er meistari, so har er nakað at fara eftir aftur í ár. Og eftir at hava spælt nakrar dystir, haldi eg, at tað er realistiskt at stíla eftir at koma heilt upp á máltindin.

– Um eg nú kann spæla væl í eitt ár og kanska gerast toppskjútti í Føroyum, so ivist eg ikki í, at tað kann skapa møguleikar fyri einum sáttmála í Danmark ella aðrastaðni, sigur Karsten From, sum hevur spælt einar 10 dystir á besta liðnum í FC Midtjylland.

## Skuldi kappast við beiggjan

23 ára gamli álopsspælarin hevði sín fótbóltsliga uppvøkstur í Kolding BK, og tað var eisini har, at hann gjørdi vart við seg sum vaksin spælari. Hann skoraði 28 mál í 16 dystum fyri besta liðið hjá felagnum, sum tá spældi í Danmarkseriuni, og tað vakti áhuga í einum av størstu feløgunum í Danmark.

Alt byrjaði við eini royndarvenjing í FC Midtjylland, men tað gekk ikki long tíð, áðrenn partarnir vóru samdir um ein fulltíðarsáttmála, sum skuldi ganga yvir trý ár.

– Sáttmálin við FC Midtjylland er tað størsta, sum er hent fyri meg fótbóltsliga. Tað var tann stóri dreymurin, sum var uppfyltur, sigur Karsten From.

Men dreymurin helt ikki fram við at vera ljósareyður.

– Eg helt, at FC Midtjylland hevði keypt meg sum áleypara, tí eg gjørdi so nógv mál í Kolding. Men soleiðis var ikki. Beiggi mín, Kenneth, spælir eisini har, og eg haldi, at teir høvdu start seg blindar í, at eg var sami spælari, men bara nøkur ár yngri.

– Tí kom eg at kappast um plássið sum høgri bakkur við beiggja mín, og tað var als ikki tað, sum eg hevði hug til.

## Tann føroyski kjansurin

Karsten From spældi einar 10 dystir á besta liðnum í FC Midtjylland, men hann beit seg ikki fastan, og tá ið tvey ár vóru farin av sáttmálaskeiðnum, samdust partarnir um, at tað skuldi steðga.

Tað var her, at føroyskur fótbóltur kom inn í myndina. Gamli venjarin í Kolding, Kim Ziegler, arbeiðir fyri ein fótbóltsumboðsmann, og hann greiddi frá tí føroyska møguleikanum.

– Eg tosaði eisini við venjaran í HB, men eftir at hava hugsað meg um í nakrar dagar, segði eg nei takk til tilboðið úr Føroyum, greiðir Karsten frá.

Óvissan um føroyskan fótbólt og eitt ítøkiligt tilboð frá danska felagnum Fremad Amager fingu Karsten at taka hesa avgerð. Men tá ið hálva avtalan við Amager-felagið fór fyri skeyti, leitaði Karsten aftur til føroyska tilboðið.

– Og so tók eg kjansin. Í fyrstu syftu snýr tað seg um átta mánaðir, og um tað ikki gongur eftir vild, so er tað ikki so long tíð.

## Øll eru vinarlig

Nú hevur Karsten From verið í Føroyum í nakrar mánaðir, og hann hevur fingið betri innlit í føroyskan fótbólt.

– Eg haldi ikki, at støðið er so høgt, sum eg fekk at vita frammanundan. Tey bestu liðini høvdu ivaleyst klárað seg í 2. deild í Danmark, men tað er sanniliga stórur munur á teimum góðu og vánaligu liðunum í Føroyum. Hendan munin upplivir tú als ikki í Danmark. Har eru liðini javnt góð, og tað finnast eingir vánaligir spælarar á liðunum.

Hóast hann hevur saknað damuna hjá sær fyrstu tíðina, hevur hann havt tað gott í Føroyum.

– Hold kæft, hvor er færinger flinke, sigur hann.

– Eg havi ongantíð áður møtt so fyrikomandi fólki sum føroyingum. Tað ger tað sama, hvar eg eri, so eru øll blíð og vinarlig. Eisini tá ið vit vóru í Klaksvík og spældu, komu nógv fólk og heilsaðu upp á meg og spurdu meg, hvussu tað gekk. Eg kenni meg vælkomnan her.

Hann heldur tó, at føroyingar eru sera harðir við hvønn annan á fótbóltsvøllinum. Mest sum ov.

– Føroyskir spælarar spæla hart og ikki altíð so fair. Tað er komið fleiri ferðir fyri, at eg havi hugsað, at hasin spælarin kemur ikki fyri seg aftur eftir hasa takklingina, sigur hann og heldur, at ávísar taklingar, sum hann hevur upplivað í Føroyum, so at siga ikki koma fyri í Danmark.

## Lægri støði

Hóast støðið í bestu føroysku deildini ikki er tað sama, sum í teirri bestu donsku deildini, har Karsten From vil sleppa at spæla aftur, so heldur hann, at møguleiki er fyri at fáa nakað gott burtur úr uppihaldinum í Føroyum.

– Tað verður sjálvandi spennandi, um eg kann menna meg sum spælari her og halda meg á einum høgum støði. Hetta er ikki sama støðið sum í superliguni, og so er freistandi at hugsa, at so verði eg ein verri fótbóltsspælari, men tað er ikki vist.

– Her er betri tíð til alt í dystunum, og tað ger, at eg kann arbeiða meira við teimum pørtunum av spælinum hjá mær, sum eg ynski at betra.

– Og so er tað áhugavert, at føroyskir spælarar fáa kjansin uttanlands. So her eru møguleikar fyri ein spælara sum meg, sigur Karsten From.